## Rumlustrípur í Kaldbakk

Arbeiði við at gera rumlustrípur inn eftir Kaldbaksvegnum byrjaði mánamorgunin. Rumlustrípur eru smá hol, ið gera, at tað fer at larma og ristast inni í bilinum, tá ið koyrt verður á tær. Rumlustrípurnar verða fresaðar niður í mið- og síðulinjurnar á vegnum. Kanningar í Danmark vísa, at rumlustrípurnar minka upp til 80% av vanlukkum, har fólk eru sovnaði og farin annaðhvørt út av vegnum ella á skeiva breyt. Í gjár og í dag var arbeitt á strekkinum millum rundkoyringina við Føroya Tele og Sandvíkarhjalla. Mikudagin ella hósdagin verður væntandi fari inn til Kollafjarðartunnilin, og so verður arbeitt millum tunnilin og Sund.



## Ólavsøka á Bryggjuni

Sum vant verður ólavsøkan aftur í ár eisini hildin á Norðuratlands Bryggjuni í Keypmannahavn. Tiltakið er 28.- og 29. juli, og er nógv ymiskt á skránni báðar dagarnar. Tónleikur, røður, listaframsýning við Zacharias Heinesen, gandakallur vitjar, felagssangur, føroyskur dansur, dansur og útvarping av kappróðrinum eru bert nøkur av teimum mongu tiltøkunum, sum eru á skránni ólavsøkudagarnar. Ólavsøkan á Bryggjuni byrjar leygardagin kl. 14 og endar sunnudagin kl. 19. 27. juli verður tó tjóvstarta, tá Týr hevur konsert. Á heimasíðuni hjá Bryggjuni – www.bryggen.dk/ – sæst skráin fyri ólavsøkuna í danska høvuðsstaðnum.

# Prestur fagnar G!



*Mogens Tilsted Christensen, prestur í Norðstreymoy, ynskir fría rúsdrekkasølu í Føroyum*
*savnsmynd*

**Í lesarabrævi í dagsins blað fagnar Mogens Tilsted Christensen fagnar G! Festivalinum og sigur hann, at tiltakið í Gøtu um vikuskiftið er eitt fyrstafloks dømi fyri verðsliga ungdómin**

G! FESTIVALUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í prædiku síni um vikuskiftið, umrøddi presturin í Norðstreymoyar prestagjaldi, Mogens Tilsted Christensen G! Festivalin, har hann rósti og fagnaði festivalinum, sum tá illa nokk var av.

Í lesarabrævi í dagsins blað, tekur Mogens Tilsted Christensen tráðin uppaftur úr prædiku sínari og heldur áfram við fagnaðinum av G! Festivalinum. Hann samanber G! Festivalin við stóra festivalin í Danmark, Roskilde Festivalin, og fegnast um, at hesir báðir ikki líkjast.

»Rockfestivalen (t.e. Roskilde Festivalurin, blðm.) er ikke noget godt eksempel på for Færøernes ungdom, der netop lige har afholdt sit eget store og vellykkede G-festival. Tillykke med dette arrangement, der på ingen måde ligner Roskilde druk- og hor-festival«, skrivar Mogens Tilsted Christensen millum annað í lesarabrævinum sínum, sum kann lesast í fullari longd á blaðsíðu 13 dagsins blað undir heitinum »G-festival og alkoholens forbandelser!«

### G! er best

Mogens Tilsted Christensen sigur eisini, at G! Festivalurin átti av røttum at ligið sum nummar eitt á einum lista av vælfyriskipaðum tiltøkum.

»Den burde være en førsteplads som nr. 1. Den afholdte festival var et præeksemple for den verdslige ungdom, og dem skal der nu engang også være noget for og være plads til«, skrivar presturin í Norðstreymoyar prestagjaldi, og vísir til løgregluna, sum hevði millum lítið og einki at gera dagarnar, G! Festivalurin vardi.

Fyrsta plássið, sum Mogens Tilsted Christensen sipar til, og sum G! Festivalurin eftir hansara tykki átti at fingið, er á einum lista, sum tónleikablaðið IQ hevur gjørt. IQ er eitt blað hjá ILMC, sum er stytting fyri International Live Music Conference, og ber tað orð fyri at vera ein av týdningarmestu altjóða tónl eikavinnufelagskapunum.

Tað er sjálvur blaðstjórin, Greg Parmley, sum hevur skrivað greinina, og á einum lista yvir bestu festivalarnar í Evropa kemur G! Festivalurin inn á eitt annað pláss.

Nummar eitt gjørdist Roskilde Festivalurin, sum sambært Mogens Tilsted Christensen er ein drukk- og hor-festivalur, og sostatt ikki ein góð fyrimynd fyri føroyskan ungdóm.



*Mogens Tilsted Christensen heldur at G! Festivalurin er betri enn Roskilde Festivalurin, sum er ov nógv merktur av drukk og hor*
*Mynd: Sunva Ey. Lassen*

# Ynskir fría rúsdrekkasølu

**Mogens Tilsted Christensen heldur, at føroyingar sjálvir eiga at avgera, um teir vilja keypa vín og rúsandi drykkir í matvøruhandlunum. – Íbúgvarnir í Føroyum eru ikki barnagarðsbørn, sum ansast skal eftir, sigur hann**

RÚSDREKKA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Mogens Tilsted Christensen, prestur í Norðstreymoy, kemur við einum rættiliga óvæntaðum úttalilsi í lesarabrævi í dagsins blað. Hann skjýtur beinleiðis upp, at tað í Føroyum eigur at vera frí rúsdrekkasøla.

»Alle, som vil have alkohol, kan købe det i lufthavne, i flyet, på færgerne, i Danmark og mange andre steder til det halve af den overpris, der skal betales i monopolbutikkerne. Hvorfor skal færinger være underlagt et overformynderi på den måde«, spyr Mogens Tilsted Christensen.

Hann umrøður rúsdrekkasølurnar sum »overformynderi«, og setir spurnartekin við, um tær hava nakað sum helst at gera í einum vælútbúnum og modernaðum Føroyum, sum hann tekur til.

»Den færøske befolkning er ikke en flok børnehavebørn, der skal overvåges og kontrolleres. Færøerne er i dag er et velfungerende og oplyst samfund bestående af selvstændigt tænkende mennesker.

Lad det færøske folk selv bestemme, om de vil købe vin og alkoholiske drikke i supermarkederne, lad dem gøre deres egne erfaringer og lære heraf. Alkoholforbud skaber flere alkoholskader«, sigur altso Mogens Tilsted Christensen, prestur.

Í sama lesarabrævi slær Mogens Tilsted Christensen tó fast, at ungdómur, festivalar og rúsdrekka er ein vandamikil samansjóðing, og presturin sigur eisini, at tað er eingin orsøk til at taka alkohol í forsvar.